KÍ vann í Leirvík

LÍF dragnar í stríðnum um uppflyting, og klaksvíkingar liggja í løtuni í miðjuni í einari sera javnari kapping í 2. deild

2. DEILD MENN
Páll Holm Johannesen

Við sera effektivum spælið í Leirvík, vunnu klaksvíkingar 3-1 á LíF leygardagin. Leirvíkingar høvdu bóltin meira, men við góðum kontra-fótbólti, vóru tað kortini gestirnir, sum fóru um fjørðin aftur, við øllum trimum stigunum.

Styrkt KÍ-lið

Av tí at ongin 1.deildar fótbóltur var um vikuskiftið, vóru fleiri leikarar úr 1.liðs hópinum hjá KÍ við á øðrum liðið leygardagin. Leikarar sum Erling Fles, Harley Bertholdsen, Jan Andreasen og Símun Joensen, er allir vanliga við á 1. liði, men ongin teirra var á vøllinum á Sevmýri imóti TB seinasta vikuskiftið, og tí kundu teir verða við ímóti LÍF.

Í fyrra hálvleiki var tað heimaliðið, sum hevði yvirvág í spæli, men kortini vóru tað gestirnir úr Klaksvík, sum fingu fyrsta málið í dystinum. Harley Bertholdsen brýtur ígjognum í vinstru, og við góðari sending finnur hann veteranin, Olgar Danielsen, sum við innarusíðuni, kundi leggja KÍ frammum 1-0. Hetta var sjeynda málið hjá Olgari Danielsen í ár.

LÍF var tætt við at fáa mál nakrar reisur í fyrra hálvleiki, men inn fór bóltur in ikki, og kanska ikki heilt uppiborið vóru tað gestirnir, sum høvdu hálvleiksleiðsluna.

Í øðrum hálvleiki legði heimaliðið trýst á KÍ, men tað spurdist kortini onki mál burturúr. Í staðin kundi gestirnir økja um leiðsluna. Miðskeiðis í seinna hálvleiki fær KÍ fríspark í høgru síðu, sum John Ryan tekur. Við aftaru stong finnur John Harley Bertholdsen, sum við einum góðum skotið kundi leggja KÍ frammum 2-0.

Leirvíkingar hildu fram við at trýsta KÍ, men ein vælleikandi KÍ verja og málmaðurin gjørdu sítt til, at leirvíkingar ikki fingu nakað burturúr leikligu yvirvágini.

15 minuttir fyri leiklok fóru klaksvíkingar aftur í eitt mótálop, og við einum hegnisligum lobbara, avgjørdi Gunnleivur Biskupstøð dystin. Hetta mundi kennast sera hugtungt fyri heimaliðið, sum meginpartin av dystinum hevði leikliga yvirvág, men kortini vóru gestirnir, ið høvdu gjørt málini í dystinum.

LÍF fekk minkað um munin stutt fyri leiklok, og tað var Fróði Joensen, sum fekk seinasta fót á.

LÍF dragnar

Tað hevur ikki gingið nakað serligt hjá leirvíkingum í seinnu helvt, og hava teir bert fingið eitt stig úr nøggju møguligum. Skulu leirvíkingar framhaldandi vera við í kappingini um uppflyting, so skal vend koma í.

Argastu kappingarneytarnir í løtuni um eitt uppflytingarpláss, Sumba og B71, eru ávikavist 2- og 3 stig frammanfyri LÍF, so møguleikin fyri uppflyting hjá leirvíkingum er avgjørt til staðar enn.

Klaksvíkingar kunnu við sigrinum um vikuskftið, kenna seg eitt sindur tryggari í 2.deild, men tað gongur skjótt fyri seg báðar vegir, og komandi vikuskiftið fær KÍ vitjan av B36, og vinnur KÍ dystin, so eru teir við í oddinum í 2. deild.

Dysturin í tølum:

LÍF-KÍ 1-3 (0-1)
0-1 Olgar Danielsen
0-2 Harley Bertholdsen
0-3 Gunnleivur Biskupstøð
1-3 Fróði Joensen

Harley Bertholdsen var ein av leikarunum, sum hjálpti øðrum liði hjá KÍ um vikuskiftið, og væl gekst, ti KÍ vann 3-1 á leirvíkingum

Mynd: Savnsmynd

Máltindurin, 2. deild

Clayton Soares	FSV	10
Jónsvein Thomsen	B71	7
Bjarni Prior	FSV	7
Heini Heinason	ÍF	7
Olgar Danielsen	KÍ	7
Eirikur Joensen	Sumba	7
Kristian í Vági	LÍF	6
Tórálvur Poulsen	B36	5
Rúni Petersen	ÍF	5
Petur Sjúrðarberg	LÍF	5
Jens Erik Rasmussen	FSV	4
Rókur á Fløtum Jespersen	HB	4
Mortan Hansen	NSÍ	4
Birgir Jørgensen	VB	4
Carl Høgnesen	B36	3
Eyðun Højgaard	B36	3
Símun Hansen	B71	3
John Johansen	FSV	3
Kim Poulsen	FSV	3
Ruslan Screlea	FSV	3
Eyðálvur Petersen	ÍF	3
Høgni á Lakjuni	ÍF	3
Høgni Zachariasen	ÍF	3
Bárður Heinason	LÍF	3
Símun Samuelsen	VB	3

Knúsandi B71 sigur

Eftir at Sumba-málverjin varð rikin av vølli, skrædnaði hjá sumbingum

2. DEILD MENN
Páll Holm Johannesen

Sandoyingar høvdu vitjan av sumbingum leygardagin, og høast talan var um ein oddadyst, so hølvaði heimaliðið gestirnar av. Endaliga úrslitið gjørdist heili 7-1 til B71, eftir hálvleiksstøðuna 2-1.

Einvegis ferðsla

Í fyrra hálvleiki var ikki so stórur munur á liðunum, høast B71 hevði yvirvág í spæli. Tað var kortini Sumba, sum legði seg á odda í dystinum. Eftir hornaspark endar bólturin hjá Hans Jákupi Thomsen, sum við skoti uttan brotsteigin, kundi leggja gestirnar frammum.

B71 svaraði skjótt aftur, og javnaði við máli, sum Ib Mohr Olsen fekk eftir hornaspark. Tað vóru royndir á mál frá báðum pørtum, uttan tó at nakað ítøkiligt spurdist burturúr.

Beint fyri hálvleikssteðgin, eydnaðist heimaliðnum at leggja seg frammum. Eftir trunkapæl frammanfyri máli hjá sumbingum, fekk polendingurin, Krystof Rabzienski, seinasta fót á, og so stóð 2-1 til sandoyingar.

Hálvleiksstøðan var eisini 2-1 til B71. B71 hevði leikliga yvirvág í fyrra hálvleiki, og av Sandi verður sagt, at hálvleiksleiðslan var fult uppiborin.

Málverjin rikin av vøllinum

Í seinna hálvleiki varð málverjin hjá sumbingum rikin av vøllinum, eftir at hann nýtt neyðbremsuna. Eftir útvísingina fullu sumbingar fullkomiliga í fátt, og málini skolaðu inn. Av Sandi verður sagt, at tað snøgt sagt var bert eitt lið á vøllinum í seinna hálvleiki. Í seinna hálvleiki skutu sandoyingar heili fimm mál, og endaliga støðan gjørdist eisini heili 7-1 til B71. Málini í seinna hálvleiki hjá heimaliðnum skutu, Rúni Joensen 2, Arunas Mika, Ib Mohr Olsen og Jónsvein Thomsen.

B71 og Sumba alt at spæla fyri

Bæði Sumba og B71 hava framvegis alt at spæla fyri. Liðini bæði eru í løtuni bestu boðini uppá eitt annað pláss í 2.deild, og harvið ein upp- og niðurflytingardyst ímóti næst niðasta liðnum í 1.deild.

B71 og Sumba hava sera torførar útidystir komandi vikuskiftið. Sumbingar skulu møta ÍF í Fuglafirði, meðan B71 skal til vágarnar.

Dysturin í tølum:

B71-Sumba 7-1 (2-1)
0-1 Hans Jákup Thomsen
1-1 Ib Mohr Olsen
2-1 Krystof Radzienski
3-1 Rúni Joensen
4-1 Arunas Mika
5-1 Ib Mohr Olsen
6-1 Rúni Joensen
7-1 Jónsvein Thomsen

Hóast talan var um oddadyst millum B71 og Sumba, so vunnu sandoyingar dystin heili 7-1

Mynd: Savnsmynd

Støðan, 2. deild menn

		dystir	v	j	t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	FS V	12	8	3	1	38	8	30	27
2	B36	12	5	4	3	17	17	0	19
3	B71	12	5	3	4	21	11	10	18
4	Sumba	12	5	3	4	16	20	-4	18
5	KÍ	12	4	4	4	17	17	0	16
6	NSÍ	12	5	1	6	13	20	-7	16
7	LÍF	12	4	3	5	20	20	0	15
8	ÍF	12	4	2	6	24	26	-2	14
9	VB	12	4	1	7	13	34	-21	13
10	HB	12	3	2	7	16	22	-6	11

»Todi hjá Liktinstein« er aftur á landsliðnum

LANDSLIÐIÐ
Ivan Eginsson

Tað kemur verri enn so ofta fyri, at føroyska fótbóltslandsliðið í einum altjóða dysti skal møta einari tjóð, ið er minni, enn Føroyar sjálvar. Tað eru bert tvey limalond í UEFA, ið eru aftanfyri Føroyar – bæði í fólkatali og í stødd. Í San Marino búgva umleið 27.000 fólk, meðan Liktinstein hevur fólkatalið, ið er nakað yvir 31.500 (tað vil siga, nøkulunda tað sama, sum í Føroyum uttan Tórshavn).

Liktinstein varð viðurkent av FIFA, sum limaland, so langt síðan sum í 1974. Sjey ár gingu kortini, áðrenn tað lítla fjallalandið leikti fyrsta altjóða dyst sín, tá ið tað tapti 0-1 fyri stóra grannanum hjá sær, Sveits. Liktinstein helt sær kortini burtur frá HM- og EM-undankappingum fram til 1994, men hevur verið uppi í hvørja ferð síðan tá. Ikki heilt óvæntað hava tey flestu úrslitini verið so sum so. Eina ferð tapti liðið heili 11-1 á heimavølli fyri Makedonia. Kortini hevur Liktinstein tey seinastu árini havt eina støðuga framgongd, ikki minst orsakað av frálíkum ungdómsarbeiði í landinum. U-16 og U-18 landsliðini hjá Liktinstein hava fleiri góð úrslit at vísa á – millum annað 1-0 sigurin á teimum føroysku dreingjunum fyri trimum árum síðani, – og miðaldurin hjá tí liktinsteinska A-landsliðnum er tann lægsti í Evropa í løtuni.

Landsliðið hjá Liktinstein hevur leikt tríggjar vinardystir higartil í ár. Sum kunnugt, taptu teir 0-1 fyri Føroyum á venjingarleguni á Kýpros í februar. Síðst í mars eydnaðist tað liðnum undir leiðsluni hjá tí 39-ára gamla týskaranum Ralf Loose at fáa málleysan javnleik á heimavølli ímóti Norðurírlandi, og í apríl var tað pinkalítla fúrstardømið sera nær einum heldur óvæntaðum útisigri í Luksemburg. Liktinstein var á odda 3-0 síðst í 1. hálvleiki, takkað hattrikkinum hjá Martin Stocklasa (hetta var fyrsta ferð yvirhøvir, at liktinsteinska liðið megnaði at gera heili trý mál í einum dysti). Men Liktinstein fekk tveir menn útvístar eftir steðgin. Hetta hjápti Allani Simonsen og nýggja liði hansara at sleppa undan eyðmýking í dystinum ímóti næstminsta landinum í UEFA. Endaliga úrslitið gjørdist 3-3.

Til stóra gleði hjá øllum liktinsteinsku viðhaldsfólkunum, boðaði tann mest viðagitni leikarin í landinum nakrantíð, Mario Frick, fyri kortum frá, at hann var sinnaður at koma aftur á landsliðið. Tann 27-ára gamli áleyparin er fastur maður á besta liðnum hjá italska stórfelagnum Hellas Verona, sum m.a. Preben Elkjær spældi fyri miðskeiðis í áttati-árunum. Fyri hálvum øðrum ári síðani bar Mario Frick seg undan at leika fyri Liktinstein, tí at »hann var troyttur av at tapa so at siga hvørja ferð«. Eftir ta avgerðina hevur yrkisleikarin hjá Verona ikki verið serliga væl umtøktur millum landsmennirnar, sjálvt um allir hava teir verið ernir av umboði sínum í einari av fremstu fótbóltsdeildunum í Evropa. Men nú broytti Mario Frick støðu sína og hann sigur seg síggja fram til komandi EM-dystirnar, og ikki minst teir ímóti Onglandi. Sambært Frick sjálvum, kann ein dystur ímóti eitt nú enska landsliðnum ikki samanberast við nakran dyst á klubstigi. Her er vert at minna á, at júst landsliðsmálið, ið táverandi leikari úr einum lítið sigandi sveisiskum felagi skoraði fyri Liktinstein ímóti Týsklandi í vinardystinum í 2000, hjálpti Mario at fáa nógva umrøðu uttanlands og útvega sær sáttmala í Italia. Annars kann nevnast til stuttleikar, at í 1993 bleiv systknabarn hansara, ið ber sama fornavn og eftirnavn, tann yngsti forsætisráðharrin í Evropa í nýggjari tíð, bert 28 ára gamal. Hasin Mario Frick sat við róðri landsins í átta ár, fram til 2001.

»Todi hjá Liktinstein«, Mario Frick, er við aftur á landsliðnum hjá Liktinstein, sum mikudagin skal royna seg á Tórsvølli

Burtursæð frá yrkisleikaranum í Verona, eru tveir aðrir menn hjá Liktinstein verdir at leggja merki til. Báðir eru teir sáttmálabundnir at fremstum felogum í Sveits. Evnariki Peter Jehle var bert 16 ára gamal, tá ið hann vardi málið hjá A-landsliði sínum á fyrsta sinni. Í dag er hann 20 og hevur longu spælt 23 landsdystir. Verjuleikarin Marko Nigg er eitt nýtt og spennandi andlit á liðnum.

Tann 23-ára gamli miðvallaleikarin Martin Stocklasa hevur longu verið við í meira enn 30 landsdystum. Við fýra málum – trý teirra komu, sum skrivað áður, í seinasta dystinum í Luksemburg – er hann besti málskjúttin hjá Liktinstein nakrantíð (tann kendi Mario Frick hevur bert tríggjar ferðir verið á máltalvuni).

Metmaðurin hjá Liktinstein í landsdystum – 27-ára gamli verjuleikarin Daniel Hasler – hevur 41 ferðir spælt við bláu troyggjuni hjá liðnum, sum hann er liðformaður á. Hann umboðar eitt felag í næstbestu sveisisku deildini.

Allir teir bestu leikararnir hjá Liktinstein eru tøkir til dystin á Tórsvølli, burtursæð frá teimum skaddu miðvallarunum, Patrik Hefti og Mario Wolfinger, og so yrkisleikaranum í sveisiska Stade Lausanne, Frédérik Gigon, ið er farin á brúdleypsferð.

Venjarin hjá Liktinstein, Ralf Loose, eigur met í U-21 landsdystum fyri Týskland, men ongantíð kom hann á týska A-landsliðið, sjálvt um hann í nógv ár leikti við einum so kendum felagi, sum Borussia Dortmund. Ralf Loose, ið hevur yvir 200 dystir í bundesliguni á baki, tók við sum landsliðsvenjari hjá lítlu týskt-mæltu tjóðuni í 1998, eftir at hann í tvey ár hevði arbeitt við tey liktinsteinsku unglingalandsliðini.

Liktinstein er tað einasta UEFA-limalandið, ið onga landskapping hevur. Tey sjey feløgini í landinum luttaka í lægri deildum í Sveits. Tað besta felagið man vera FC Vaduz, ið sum oftast vinnur liktinsteinsku steypakappingina og er javnan við í evropeisku UEFA-kappingini. Júst hetta felagið er best umboðað á landsliðnum hjá Liktinstein. Í síðstu viku spældi FC Vaduz 1-1 á heimavølli ímóti skotska FC Livingston í UEFA-steypakappingini.

Samanlagt hevur Liktinstein leikt 54 altjóða skrásettar dystir higartil og skorað 17 mál í teimum. Bert sjey ferðir hevur liðið sloppið undan tapi, m.a. í EM-undankappingum ímóti Írlandi og Ungarn (0-0 báðar ferðirnar), meðan tveir dystir av hesum sjey eru vunnir. Í 1998 basti Liktinstein Aserbaidjan 2-1 á heimavølli í EM-undankappingini. Hin sigurin er á nógvan hátt minniligur. Í 1982 fekk liktinsteinska landsliðið innbjóðing at vera við í eini trýlandakapping í Asia. Dystin ímóti Indonesia taptu teir 2-3, men hin – ímóti Kina – endaði við sjelkandi 2-0 sigri til Liktinstein. Soleiðis mátti nógv tað fólkaríkasta landið í heiminum lúta fyri einum tí allarminsta!

Higartil hava Føroyar fingið 100% úrslit í teimum fýra dystunum ímóti teimum báðum minstu UEFA-limalondunum – 3-0 og 3-1 sigrarnir á San Marino í 1995, og so tvey sigursmál hjá Una Arge ímóti Liktinstein fyri tveymum árum síðani í Vaduz og aftur í februar í ár. Hagtølini benda á, at føroyingar eru favoritar til dystin í Havn. Men einki er at ivast í, at gestirnir eru komnir til Føroya ikki fyri at tapa á tríðja sinni á rað. Liðið hevur, sum sagt, staðið seg væl í ár, og eigur ein avgjørdan trumf við Mario Frick, leikstøði hvørs er munandi hægri enn tað hjá nøkrum øðrum spælara á Tórsvølli mikukvøldið. Tað er bara spell, at føroyska liðið ikki er ført fyri at stilla allar bestu leikarar sínar upp ímóti Liktinstein. Vónandi fer hetta ikki at ávirka endaliga úrslitið, ið eigur at vera eins gott og í dystunum við sama mótstøðuliðið frammanundan. Føroyar hava als ikki ráð til at missa stig á heimavølli ímóti einari tjóð við minni enn 32.000 íbúgvum, tí verður eitt annað úrslit, enn ein sigur, roknað sum eitt stórt vónbrot frá síðu okkara.

Liktinsteinski hópurin
til dystin á Tórsvølli telur 18 leikarar. Teir eru:

	føðingardagur	dagliga við	dystir	mál
Málmenn				
Peter Jehle	22.01.1982	»Grasshopper Club« Zürich SVEITS	23	
Martin Heeb	05.11.1969	»USV Eschen/Mauren«	20	
Verjuleikarar:				
Daniel Hasler	18.05.1974	»FC Wil 1900« SVEITS	41	1
Harry Zech	25.02.1969	»USV Eschen/Mauren«	38	1
Jürgen Ospelt	16.01.1974	»Chur 97«	35	
Michael Stocklasa	02.12.1980	»FC Vaduz«	24	
Christof Ritter	18.01.1981	»FC Vaduz«	20	
Marco Nigg	28.06.1982	»FC St.Gallen« SVEITS	2	
Miðvalla- og álopsleikarar:				
Mario Frick	07.09.1974	»Hellas Verona« ITALIA	35	3
Martin Telser	16.10.1978	»FC Vaduz«	32	1
Martin Stocklasa	29.05.1979	»FC Vaduz«	31	4
Thomas Beck	21.02.1981	»FC Vaduz«	20	
Ronny Büchel	19.03.1982	»FC Vaduz«	15	
Matthias Beck	05.10.1981	»FC Triesen«	13	
Andreas Gerster	24.11.1982	»FC Vaduz«	6	
Franz Burgmeier	07.04.1982	»FC Vaduz«	5	
Fabio D'Elia	19.03.1983	»Chur 97«	5	
Thomas Nigg	28.06.1983	»USV Eschen/Mauren«	5	

Sosialurin
www.sosialurin.fo